# Einki hvørvur. Sundur- og samanrenningar í yrkingasavninum *Korallbruni* (2018) eftir Onnu Maluna Jógvansdóttur. Ein viðgerð við støði í vistgreining ("ecocriticism") og evnisligari snaring ("new materialism")

fróðskapur
Faroe University Press
Fróðskaparrit 71 (2025): 241-253
©The Author(s) 2025 Open Access under Creative Commons by Attribution License. Use, distribution and reproduction are unrestricted. Authors and original publication must be credited.
www.frodskapur.fo/

## Nothing Disappears. An Ecocritical Examination of Material Entanglements in Anna Malan Jógvansdóttir's Poetry Collection *Korallbruni* (2018)

**Bergur Djurhuus Hansen**[1], Ph.d., lektari, Føroyamálsdeildin, Fróðskaparsetur Føroya

**Abstract**

This article examines Anna Malan Jógvansdóttir's poetry collection *Korallbruni* (2018) through an ecocritical framework informed by new materialism in literary studies. The poems in the collection explore the dissolution of a body in the sea and the blurring of boundaries between the human and the non-human. Bodily substances transform, disintegrate, enter new connections, become energy, and never fully disappear. Words marking thresholds between different worlds or stratums of life and being – such as "shoreline", "water surface", and "skin" – recur throughout the collection. Drawing on Jane Bennett's concept of "assemblage" (2010) as well as works of Bruno Latour (1993) and Timothy Morton (2010), the article offers an ecocritical analysis of the poems. The theoretical framework is particularly apt, as the poems sensuously depict how a human subject, an "I", is embedded in networks and ceases to exist as a stable entity. From a literary-historical perspective, the

[1] T-postur: bergurdh@setur.fo

poems reflect a change in the perception of the relationship between humans and the natural environment.

**Úrtak**

Greinin viðger yrkingasavnið *Korallbruni* (2018) eftir Onnu Maluna Jógvansdóttur. Ástøðiliga grundarlagið undir viðgerðini eru hugsanir knýttar at evnisligu snaringini, *new materialism*, í bókmentagransking. Yrkingarnar í savninum lýsa, hvussu ein kroppur loysist sundur í havinum, og hvussu markið millum menniskjað og aðrar livandi verur kámast. Gøgn í kroppinum broytast, detta sundur, ganga inn í nýggjar samanhangir, verða til orku og hvørva ikki. Orð, sum benda á mørk millum ymsar lívslindir og verur, eitt nú "fjøra", "vatnskorpa" og "húð", ganga aftur í savninum. Hugtakið "assemblage" (Bennett, 2010) og hugsanir hjá Bruno Latour (1993) og Timothy Morton (2010) verða brúkt í vistgreinandi kanning av yrkingunum, ið kunnu lesast sum ein samanhangandi frásøgn. Tann evnisliga snaringin hóskar ástøðiliga væl til yrkingarnar, tí tær lýsa sansaliga, hvussu eitt menniskja, eitt "eg", gongur inn í stórar umhvørvisligar samanhangir og ikki er til sum ein avmarkað eind. Bókmentasøguliga kunnu lýsingarnar í yrkingunum lesast sum ein broyting í fatanini av menniskjans støðu í náttúruni millum aðrar verur.

**Keywords:** Contemporary Faroese poetry, ecocriticism, new materialism.
**Leitorð:** Føroyskur samtíðarskaldskapur, vistgreining, evnislig snaring.

## Inngangur

Anna Malan Jógvansdóttir er fødd í 1995. Hon gav út fyrsta yrkingasavn sítt, *Undirfloyma*, í 2015. Tíðarskeiðið 2016 til 2018 var hon á rithøvundaskúla í Keypmannahavn. Í 2018 gav hon út savnið *Korallbruni*. Í 2019 kom bókin *Psykosudrotningin sigur frá,* sett saman av stuttprosa, yrkingum, tekningum, brotum úr dagbókum og við orðinum *Hybrida* niðast á forsíðuni sum eitt slag av lýsing av útgávuni. Í 2022 fekk Anna Malan Jógvansdóttir tvey ára gávufæ úr danska Veluxgrunninum til starvsvist á Fróðskaparsetrinum. Í 2025 kom út savnið *Kobberblod. Edderkoppernes artsskifte gennem salt, jord, guld og luft* á danska forlagnum Herman & Frudit.

Í yrkingum eftir Onnu Maluna Jógvansdóttur verður víst á mørk millum heimar ella lívslindir, og hvussu mørk loysast upp, eitt nú millum mentan og náttúru, menniskju og aðrar livandi verur, dreym og veruleika. Yrkingarnar lýsa stundum eisini sundurloysandi gongdir í tilfari og í kroppum, millum húð, æðrar, gøgn og beinagrind ella grót og gjar. Øll mørk eru fyribils og broytilig. Myndir við fjøru, tara, gággum og yvirhøvur vøkstri í ella nærhendis sjónum ganga aftur í teimum báðu fyrstu søvnunum og gera vart við skiftandi mørk millum land og sjógv eins og millum eina livandi veru og aðra.

Í hesi greinini verður yrkingasavnið *Korallbruni* frá 2017 viðgjørt. Savnið kom út í danskari týðing við heitinum *Konkhjertet* ("gágguhjarta") á forlagnum

Herman & Frudit í 2021. "Gágguhjarta" er ein mynd, sum kemur fyri í savninum. Vert er at leggja til merkis samansetingina av hørðum, stirðnaðum tilfari og bleytum, seyrandi tilfari eins í upprunaheitinum korall og bruni.

## Evnislig snaring

Ástøðiliga grundarlagið undir viðgerðini eru hugsanir úr evnisligu snaringini, *new materialism*, í bókmentagransking, t.e. hugsanini um, at í øllum er megi og virknaður, ikki einans í menniskjum. Allir lutir, eisini tøkni, øll evni og øll rensl, eru í innanhýsis samvirkan og sínámillum ávirkan.

Fleiri ymiskar ástøðiligar hugsanir gera *new materialism* til eitt rák við serligum eyðkennum. Diana Coole og Samantha Frost skriva í *New Materialisms. Ontology, Agency, and Politics* (2010), at *new materialism* merkir:

> Conceiving matter as possessing its own modes of selftrans-formation, self-organization, and directedness, and thus no longer as simply passive or inert (Cool & Frost 2010: 10).

Tað nýggja í hesi materialismuni í mun til ta materialistisku hugsan, sum vit kenna úr eitt nú marxismuni, er, at ikki einans menniskjað verður hugsað sum virkið og skapandi. Kring menniskjað eru eisini virkandi máttir. *New materialism* gevur okkum tí fyrst og fremst innlit í, hvussu vit skilja og hava skilt okkum sjálv í náttúruni, ella í breiðastu merking okkum sjálv í okkara umhvørvi og yvirhøvur øllum, sum er uttan um okkum. Við her at brúka heitið evnislig snaring heldur enn nýggj materialisma verður strikað undir, at hetta kanska ikki er heilt nýtt, men í viðgerð av bókmentum er tað ein broyting í perspektivi, tí kannað verður, hvussu eitt menniskja, eitt "eg", gongur inn í stórar samanhangir og rensl í náttúruni/umhvørvinum og als ikki er til sum ein støðug, samanhangandi eind. Diana Coole & Samantha Frost skriva um "demands for more materialist modes of analysis". Tær vísa á eina uppgerð við ta málsligu snaringina, tað sonevnda "linguistic turn", í farnu øld, ið legði áherðslu á mál, orðanýtslu, sum ein skapandi mátt (Coole & Frost 2010: 2). At áherðsla verður løgd á tilfar, tað evnisliga, er fyri Cool & Frost ein snaring í mun til fleiri ráðandi ástøði frammanundan, og tað er júst ein snaring heldur enn ein uppgerð, tí orðini hvørva ikki heilt.

Serliga tvey hugtøk verða tikin fram í viðgerðini. Hugtakið "assemblage", sum heimspekingurin Jane Bennett brúkar í lýsingum av evnisligum samanrenningum við rørslu og orku, støðugum broytingum, men ongum miðdepli. Kraftin í slíkum samanrenningum er spjødd og ikki stýrd úr ávísum staði. Hugtakið stavar upprunaliga frá Gilles Deleuze, ið m.a. nevnir tað í bókini *Mille Plateaux*, ið hann gav út saman við Felix Guattari í 1980. Fyri Deuleze og Guattari eru "assemblages" heterogenar samanrenningar, mentanarliga ella sosialt, t.e. fólk, hugsjónir, stovnar osfr., sum saman gera, at okkurt hendir, uttan at hetta "okkurt" er stýrt úr ávísum staði, tað er ein tilgongd, sum eingin ávísur aktørur ella virkandi máttur hevur tamarhald á (Deleuze & Guattari 2005: 6-10). Jane Bennett setur hugtakið í nýtt høpi. Í *Vibrant Matter. A Political Ecology of*

*Things* (2010) skrivar hon: "Assemblages are ad hoc groupings of diverse elements, of vibrant materials of all sorts [...] Assemblages are not governed by any central head " (Bennett 2010: 23-24). Tað serliga við slíkum samanrenningum er sambært Bennett teirra "ability to make something happen", t.e. teirra evni til at fáa okkurt at henda (Bennett 2010: 24). Orka og skapandi megi gera, at okkurt nýtt tekur seg fram, og tað tekur seg ikki fram úr einum ávísum ella greitt avmarkaðum staði, men úr ad-hoc samanrenningum, sum menniskju og aðrar livandi verur og lutir kunnu verða partar av.

## Latour og ANT: Vit eru partar av skiftandi netverkum

Franski heimspekingurin Bruno Latour hevur í fleiri verkum ment ástøðið "Actor-Network Theory" (ANT). Vit ganga øll inn í og eru partar av støðugt skiftandi netverkum (sambondum), eingin ávirkar uttan eisini at verða ávirkaður. Eingin er oman fyri ella uttan fyri netverk av ymsum slagi, og umhvørvið er tí ikki eitthvørt uttan fyri okkum (ikki eitt um-hvørvi), vit eru í tí, og tað er eisini í okkum.

Í bókini *Nous n'avons jamais été modernes* frá 1991 (á enskum: *We Have Never Been Modern,* 1993) leggur Bruno Latour fram eina uppgerð við vanliga hugsan í vesturlendskari heimspeki og vísindum. Í hátøkniliga samfelagnum er markið millum tað, sum er natúrligt, og tað, sum er gjørt av menniskjum, blivið burtur. Hann nevnir tað "hybridisering" (Latour 1993: 11). Vit hava gjørdar lutir í okkara kroppum, vit taka evni, sum broyta renslið í okkara æðrum, vit fáa børn við tøkniligari hjálp. Í innganginum spyr hann, um holið í ozonlagnum er mentan ella náttúra? Ella um tann merkiligi vøksturin, sum stundum tekur seg fram í gomlum, dálkaðum ídnaðarøkjum, er náttúra? Latour nevnir slíkar lutir og fyribrigdi "quasi-lutir", ið bjóða okkara hugsan um mørk millum verur og fyribrigdi í heiminum av (Latour 1993: 1-3, 55). Hann ger tí upp við ráðandi hugsanir, sum hann nevnir "la Constitution moderne", á enskum "the Modern Condition" (Latour 1993: 13), og okkara hug at býta alt sundur dikotomiskt, í antin-ella, antin mentan ella náttúra, antin politikkur ella vísindi osfr. Tað mesta er bæði-og. Vit skilja ikki okkara pláss í heiminum og tær tilgongdir, sum eru í og kring okkum, um vit ikki læra at síggja okkum sum partar av netverkum. Men – og tað er avgerandi boðskapurin í bókini – tað hevur í grundini ongantíð verið eitt greitt mark millum okkum og øll hesi fyribrigdi og hesar lutir. Vit hava ongantíð staðið uttanfyri ella omanfyri og hugt at okkara umhvørvi. Umhvørvið er ikki og hevur ongantíð verið eitthvørt, sum vit kundu stíga út í og út úr aftur, tí vit eru altíð longu í tí. Vit hava sambært Latour ongantíð verið modernað, t.e. tað hevur ongantíð verið eitt greitt mark millum okkum sum livandi verur og so alt tað livandi og evnisliga rensl, sum vit uppliva kring okkum. Latour brúkar heitið "modernað" um tær broytingar í mentan og vísindum, sum eru hendar síðani seinnu helvt av 18. øld. Í bókini *Reassmbling the Social* skrivar hann um "non-humans", t.e. tað ikki-menniskjaliga, at: "They have to be actors and not

simply the bearers of symbolic projection" (Latour 2005: 10). Tað, ið vit vanliga fata sum ikki-menniskjaligt, kann ikki bara vera eitthvørt, sum vit spegla okkum í ella leggja okkara hugsanir í, tí tað er sjálvt virkið. Hóast Latour ikki beinleiðis er partur av rákinum, sum verður nevnt *new materialism*, eru hansara hugsanir skyldar við evnisligu snaringina og stuðla undir hana. Umráðandi fyri hann og aðrar ástøðingar er at fáa fram, at lutir og livandi verur ikki eru greitt avmarkaðar og støðugar eindir, men heldur eru í áhaldandi broyting og samvirkandi tilgongdum í netverkum ella sambondum. Fyri bókmentagransking, sum vanliga hevur tikið støði í menniskjum og teirra ætlanum og gerðum - eins og øðrum avmarkaðum verum og eindum í tekstum - eru slíkar hugsanir ein avbjóðing.

## Korallbruni

Savnið *Korallbruni* telur 49 bls. og er sett saman av yrkingum, ið eru framhald av hvørji aðrari og tí lesast sum ein long yrking við greiðari hendingagongd. Stórur byrjanarbókstavur verður ikki brúktur í savninum. Tað er, sum eru orðini rennandi ella eitt rensl. Teksturin í savninum heldur eisini fram av síðstu síðu heilt út á innaru síðu á permuni.

Í byrjanini nærkast eitt "eg" sjóvarmálanum, blakar seg á sjógv, druknar, og kroppurin loysist upp í sjónum millum igulker, krossfiskar, tarabrosmur, krabbar og sjónotur.

eg leggi klæðini
pent í ein bunka

[...]

fóturin
hellan
møtast hvast

"Eg" fer av helluni, av landi, út á sjógv. Síðani fær havið orðið: "deyðin er sukurtarasøtur". Eitt "eg" sansar og sigur frá, men aðrar verur og onnur meiri og minni samansett fyribrigdi í náttúruni samskifta eisini. Í yrkingunum verður hetta markað við kolon og gásareygum. "Eg" staðfestir t.d.: "mín sveitti luktar salt / míni tár smakka salt", og havið svarar (markað sum *havið* í skákskrift og síðani kolon): "hoyr mítt váta ljóð". Eitt samband er millum tær søltu væturnar í "eg" og havið.

Tað eru v.ø.o. fleiri røddir í yrkingunum, tí havið svarar, seinni eru tað gággur, krabbar og igulker, og innihaldsliga flyta yrkingarnar seg um mørk, lívslindir, á jørðini, ella kanska eru tað samantongdir heimar í heiminum, kunnu vit siga. Vit byrja í fjøruni, á markinum millum land og hav. Kroppurin skjýtur seg ígjøgnum vatnskorpuna á sjógv. Kroppurin hevur húð, men húðin loysist spakuliga sundur. Beinagrindin, sum var innaní, avdúkast, verður eitthvørt uttaná, og inni í beinagrindini er hjartað. Hjartað í beinagrindini liggur óvart og bert á havsins

botni. Mørkini kámast skjótt, millum land og hav, kropp og umhvørvi, millum tað menniskjaliga og tað, ið vit vanliga fata sum ikki-menniskjaligt. Innvølir eru úti í sjónum, og "gøgnini hveppast við", sum tað stendur. Tað er ein druknideyði, og tað gloyma vit sum lesarar ikki, men úr einum øðrum sjónarhorni er tað eisini okkurt annað: "liggi á botninum / húðin íshvít / blóðsár / eyguni stara / blátóm". Á botninum er eitt tysjandi lív. Á bls. 22 stendur:

gággurnar fáa tevið av mær
skríða gjøgnum bróstkassan
eta hold á seg av mínum blánaða vødda

eg
eri
hvít

{...]

mítt hjarta
ber beinagrindina
uttaná

"Eg" upplivir seg tægast sundur. Aðrar verur treingja á, og tær verða partar av broytingunum í sjónum. Ein vera, "eg", verður til fleiri verur ella eina hybridveru, fjølveru (Aldudóttir 2018: 89). Gággurnar krúpa inn í kroppin. Hjartað verður eitt "gágguhjarta", sum dukar "róliga í sandinum" av krykjandi lívi.

Sansaliga og litríkt lýsa yrkingarnar, hvussu lív tekur seg upp í og rundan um sundurloysta kroppin. Einki hvørvur, formar við lívbrigdum loysa hvønn annan av. Framvegis er tað "eg", ið sigur frá, men nú sum eitt annað slag av "eg", og røddin er ikki eins týðilig og at byrja við.

Á bls. 38-39 í savninum verður tilgongdin lýst sum ein føðing. Kropsligi deyðin er sum ein endurloysn. Neyðugt er at endurgeva stóran part av yrkingini:

tann kaldi streymurin førir hvalspýggjurnar hagar

tær leggja seg sum ein skorpa
líkjast húð
havhúð

tvær hvalspýggjur
dala niður
føli tað korkalitta slýggið
bleytt
á harða
bróstkassanum
festa seg
á hvør sítt rivjabein

verða til havbróst
so havið kann streyma í mær

[...]

míni bróst
standa á tambi
av smádjórum

[...]

eg eri gjøgnumskygd nú
síggi løðingarnar
streyma gjøgnum mínar silvurtræðrir
neistra gylt úti á endanum

rurandi
rurandi
fiskafongurin
í
mær

Vert er at leggja til merkis, at longri frammi í savninum, á bls. 6, vóru tað naknu føturnir, sum vóru bleytir móti hvøssu helluni, nú er tað beinagrindin, sum er hørð og hvalspýggjurnar bleytar. Slík skifti koma støðugt fyri í yrkingunum. Kropslutir, gøgn og verur í sjónum renna saman. "Eg" var fyrst hvít, vøddarnir seinni bláir og seinni aftur purpur. Í yrkingini kemur orkan úr fleiri ættum. Eingin miðdepil er, ikki eitt eg, sum vil eitthvørt, men bæði í og rundan um "eg", kroppin, er rørsla og samansett orka. "Eg" er bæði ein deyður kroppur og ein fjølvera í havinum. Fjølveran elur fram lív og staðfestir: "fiskafongurin í mær", eins og eru smáu fiskarnir í deyða kroppinum avkom. "Eg" er tilfar, gongur inn í rørslurnar og orkufyltu umskiftini. Jane Bennett skrivar um samanrenningar, at tær eru:

> living, throbbing confederations that are able to function despite the persistent presence of energies that confound them from within [...] an assemblage is never a solid block but an open-ended collective (Bennett 2010: 23-24)

"Assemblages" eru brestandi, glampandi samanrenningar, ið virka og ávirka. Áhaldandi órógv er í teimum. "Eg" er ein dukandi samanrenning á havsins botni við fleiri orkukeldum, ið virka innanífrá og streyma í allar ættir: "síggi løðingarnar / streyma gjøgnum mínar silvurtræðrir". Tær flytingar um mørk, sum vóru týðiligar at byrja við, verða minni týðiligar. Húð, beinagrind, hár, gøgn eru ikki longur avmarkað, eingin vera er fullkomiliga avmarkað frá aðrari. Gongdin verður í yrkingunum lýst sum ein spjaðing, distributión, og síðani sum ymsar samanrenningar av vøkstri, gøgnum og smáum verum. "Eg", sum fyrst er ein klár rødd í einum kroppi, verður til aðrar verur og nýggja orku.

Á bls. 24-25 í savninum er ein kardiografisk mynd, sum vísir skráseting av heilavirksemi og hjartasláttri. Tað er, kunnu vit siga, ein onnur skrift, sum lýsir somu evnisligu gongd sum yrkingarnar. Strikurnar á myndini eru ein roynd at nærkast evnisligu gongdini á annan hátt við aðrari fagurfrøði, og tær vísa, at hjartaslátturin steðgar og heilin við. Kroppurin heldur tó fram sum tilfar, og tann orkan er ikki eins løtt at skráseta. At leitað verður til annað slag av skrift og onnur tekn fyri at lýsa slíkar tilgongdir er eitt eyðkenni fyri evnisligu snaringina í skaldskapi og bókmentum yvirhøvur. Grundbøkur sum t.d. *Ecocriticism. The Essential Reader* hava fleiri sløg av teksti við (Hiltner 2014). Í danska tíðarritinum *Ny Jord* eru bæði skaldskapur, yrkistekstir, myndir og tekningar, tí endamálið er fyrst og fremst at "gentænke fremtiden" og skapa "nye fortællinger om natur" (*Ny Jord* 2020: 4-5), t.e. at hugsa og siga søgur um menniskju og náttúru av nýggjum.

## Vakurt og ófrættakent

Yrkingarnar í *Korallbruna* eru kortini ikki bara ein lýsing av evnisligum tilfari og broytingum. Tær eru melankolskar, fullar av longsli og um somu tíð ófrættakendar. Fyri lesaran er tað bæði óhugnaligt og vakurt at nærkast evnisliga renslinum og tilfarinum í deyða kroppinum.

Á bls. 45 hava aðrar verur enn "eg" orðið:

havið:
"altíð er vandi á ferð"
igulkerini:
"vit koma krúpandi
úr myrkrinum
hungra eftir føði"

[...]

millum mínar tonglar vaksa nú
krossfiskaliljur
fingraliljur
kjøtliljur
súgvililjur

"Eg" hevur nú tonglar, og aðrar verur siga frá gjøgnum "eg". Savnið lýsir á henda hátt umskapanir, broytingar, eitt rensl, har einki hvørvur, men tilfar í einum kroppi verður til annað tilfar og lív. Í øllum er rørsla, millum disintegratión og integratión, sundur- og samanrenningar.

Heitið *Korallbruni* kundi bent á, at okkurt ikki er, sum tað eigur at vera. Tað er bruni í korallunum. Sum nevnt eru í savninum mótsetningar millum hart og bleytt, millum okkurt, sum er stirðnað, og okkurt, sum rennur, flýtur ella seyrar. Vit vita, at perlur í korallum sum í øðrum skeljadjórum, eitt nú øðum, evnast til, tí eitt fremmant likam, ein snultari ella eitt sandkorn, rekst inn í tey. Øðan verjir

seg við at leggja sevju, perlumóður, skyggjandi løg, rundan um snultaran, og tað verður til eina perlu. Heitið kann sipa til yrkingarnar sum lýsingar av hesi tilgongd, har ymisk evni renna saman og fáa form.

## Tað merkiliga

Orðingarnar og mongu myndirnar í yrkingunum leiða fram til hugsanina um "strange strangers", t.e. merkiliga ókend, sum ástøðingurin Timothy Morton hevur brúkt í vistgreinandi viðgerð av bókmentum. Hugtakið lýsir fyribrigdi, sum tykjast kend og ókend um somu tíð. Vit kunnu sambært Morton ikki spegla okkum í náttúruni og eiga ikki at lýsa aðrar verur sum eitthvørt, ið ger nyttu ella hevur ein ávísan leiklut í mun til okkum. Vit eiga heldur ikki at geva djórum ella øðrum livandi verum alt ov menniskjaligar eginleikar, hann nevnir tað "sadistic-sentimental bambification" (Morton 2010a: 184). Kortini eru vit í stóran mun úr sama tilfari og ganga inn í somu skipanir sum alt annað kring okkum. Tað, sum ikki er vit, er fremmant, men tað er eisini kent, tað er "strange", merkiligt, tískil merkiligt og fremmant, "strange strangers". Morton skrivar í *The Ecological Thought* (2010):

> The strange stranger [...] is something or someone whose existence we cannot anticipate. Even when strange strangers showed up, even if they lived with us for a thousand years, we might never know them fully - and we would never know whether we had exhausted our getting-to-know process (Morton 2010b: 42)

Tað, sum ikki er sum vit, er á markinum til, hvat vit eru før fyri at ímynda okkum, men vit mugu vera í tí, halda út at liva og vera saman við tí, ið ikki er sum vit (uttan at gera tað til okkurt kent). Í yrkingunum í *Korallbruna* góðtaka vit krabbar og igulker og aðrar verur uttan at kenna okkum aftur í teimum, hóast tær í yrkingunum tosa og kundu mint um menniskju.

Fyri Timothy Morton snýr uppgerðin í vistgreining seg um orðini og myndirnar, sum vit brúka eitt nú í skaldskapi ella í skriving yvirhøvur. Ástøðiliga kunnu vit siga, at vit fyri at viðgera *Korallbruna* fáa mest burturúr, um vit leggja tað evnisliga og tilfarsliga, "matter", afturat hugsanini um, at mál skapar veruleika – ella at mál er við til at ala fram okkara hugsanir um okkara umhvørvi. *New materialism* ger á henda hátt upp við undanfarin rák í bókmentagransking, serliga poststrukturalismu. Tað evnisliga er virkið, bíðar ikki eftir at verða aktiverað ella fáa skap við orðum. Ávirkan er millum øll evni og allar lutir, og tað er ein ávirkan og tilgongd, sum ikki hevur brúk fyri máli, orðum, hóast vit lýsa hana við orðum. Morton vísir á dømi úr enskum bókmentum og heldur, at ein romantisk náttúrufatan hevur lært okkum, at náttúran er vøkur og merkt av samljóði. Djór verða t.d. sálarkveikt, fáa ond. Men náttúran er eisini skitin og disharmonisk, kaotisk (Morton 2010a: 18-22). Hann skjýtur upp, at vit heldur brúka hugtakið "the mesh", ið merkir net ella samanknýttir træðrir, um náttúruna, tí orðið "náttúra" dregur við sær ov nógvar hugsanir um tað órørda

og vakra frá einari farnari tíð: “All life forms are the mesh, and so are all dead ones, as are their habitats, which are also made up of living and nonliving beings” (Morton 2010b: 29). Alt er á sama stigi og í somu skipan. Øll støð í “the mesh” eru í miðjuni, og øll eru uttast í útryðjuni, tí einki er uttast ella innast. Vistgreining í bókmentum snýr seg júst um fáa hesar hugsanir fram í viðgerðini av tekstum.

Í yrkingunum í *Korallbruna* tykjast vera nøkur eyðkenni frá romantiskum skaldskapi. Livandi verur tosa í havinum, og yrkingarnar eru litríkar, vakrar, men tær eru um somu tíð óunniligar, og samljóð eyðkennir ikki lýsingarnar í teimum. Tað eru heldur tilgongdir í “the mesh” enn eina friðsæla náttúru, yrkingarnar lýsa. Jane Bennett skrivar samsvarandi í greinini “Systems and Things”:

> “poetry can help us feel more of the liveliness hidden in such things and reveal more of the threads of connection binding our fate to theirs” (Bennett 2015: 232)

Yrkingar og skaldskapur sum heild kunnu sambært Bennett avdúka “threads of connection” fyri okkum. Vit kunnu nærkast “matter”, tí tilfarsliga, ymsar vegir, og skaldskapur ger tað á ein serligan hátt. *Korallbruni* fær lesaran at uppliva verur, rensl, tilgongdir og “the liveliness hidden in such things” við at brúka málið øðrvísi enn vanligt.

## Hvør sigur frá?

Spyrjast kann, hvaðani sagt verður frá í yrkingunum, um vit ikki hava ein miðdepil, eitt støðugt “eg”, men ein kropp, sum loysist sundur? Í reglunum trý til fimm í inngangsyrkingini er eitt svar:

*leggur tú mín skølt*

*móti oyranum*

*hoyrir tú havið suða*

Yrkingin stendur fyri seg í skákskrift og ber eitt sjónarhorn úr deyðanum (“skøltur”). Síðani byrja yrkingarnar. Yrkingarnar eru tí ein hugsað tilgongd við einari øðrvísi mynd av okkum sum livandi verum á jørðini, enn vit eru von við í bókmentum úr 19. og 20. øld.

Sum nevnt er ein longsil, tráan, í savninum. “Eg” stoytir seg at byrja við á sjógv og staðfestir: “skil tað / eg eri noydd”. Móti endanum verður staðfest: “Eg / eri / blá”. “Eg” er at enda vorðin hav, er í sjónum, sum “eg” annars týðiliga ikki var í at byrja við.

## Havfrúgvin

Seinastu reglurnar í savninum avdúka eina slóð aftur til kenda ævintýrið “Den lille Havfrue” (1837) eftir H. C. Andersen. Havfrúgvin í ævintýrinum vil upp á land og endar sum ein sveimandi ond. Í *Korallbruna* er gongdin øvut, eitt “eg”,

ein kvinna, vil á sjógv, niður á havsins botn. Mótsetningurin millum ond og jørð/tilfar í ævintýrinum verður snaraður til ein longsil eftir tí tilfarsliga, eftir "threads of connection", træðrir av sambondum. Tað romantiska í ævintýrinum verður vent við. Lesarin flytur seg niður á havsins botn, og "eg" verður ikki ein ond, men tysjandi verur alast fram í "eg", ið verður ein fjølvera og til endans blá sum havið. Ævintýrið um havfrúnna byrjar: "Langt ude i Havet er Vandet saa blaat" (Andersen 1970: 52). *Korallbruni* endar: "eg / eri / blá / streymi / langt / vekk / frá / landi / eg eri blá". Í *Korallbruna* er menniskjað ikki ein ond ella ein vera oman fyri ella uttan fyri umhvørvi ella náttúruna, men evnisliga felt inn í hana.

## Mýtur

Tað, sum vanliga verður nevnt ond, verður kortini ikki slept, tí í orðunum eru mentan og fleiri hugsanir. Tað ævintýrliga og sagnarliga lúrir undir mongu lýsingunum. Íslendski rithøvundurin Andri Snær Magnason skrivar í bókini *Um tímann og vatnið* (2019), at broytingarnar í umhvørvi og veðurlagi í okkara tíð eru so ógvusligar, at tær krevja eitt nýtt mál og nýggjar søgur. Tær søgur, vit hava sagt higartil, lýsa ikki broytingarnar nóg væl, og teir myndburðir, sum vit hava brúkt, røkka ikki. Broytingarnar í okkara náttúru og veðurlagi ganga skjótt og eru mýtiskar, "slíkur hraði er guðsögulegur", skrivar hann (Andri 2019: 9). Íblástur kann tí heintast úr gomlum mýtiskum søgum um størri samanhangir og ógvusligar kreftir í jørðini, sum menniskjað má geva seg undir.

Í *Korallbruna* koma mýtiskar søgur óbeinleiðis fram, har ímillum søgan um havgudinnuna Sednu í inuitiskari mýtologi. Sambært søguni, verður hon lokkað heim til ein havhest, ið hevur gjørt seg um til ungan mann. Tá hon varnast tað, setur hon sær fyri at rýma frá honum, og pápin kemur eftir henni í báti. Havhesturin leggur á tey, og sjógvurin reisist kring bátin. Fyri at sleppa undan vanda tveitir pápin Sednu fyri borð, men hon krøkir seg í stokkarnar á bátinum. Pápin sker fingrarnar av henni, og hon verður tikin út á sjógv. Fingrarnir verða til sjódjór, og Sedna verður havgudinna (Selesky 1996: 73).

Í *Korallbruna* verður druknideyðin ikki lýstur sum vakur. Havið lokkar við róligum deyða, men staðfest verður, at: "tað / var / lygn". Druknideyðin er líðing. "Eg" svimur móti landi, borar neglirnar í helluna, og á bls. 17 stendur: "grótið sker / fingrarnar". Blóðið rennur, og "eg" missir "festið". Yrkingin lýsir ikki eina friðarlig samanrenning í sjónum. Aðrar livandi verur leggja heldur einki í "eg", hóast tær eru í sama rensli og eru til undir somu treytum sum "eg".

Við at venda einum ævintýri við romantiskari náttúrufatan við og leita til fyrndargamlar mýtur fær yrkingasavnið fram eina hugsan um, hvussu vit siga og kunnu siga søgur um okkum og okkara umhvørvi. Nógvar av teimum søgunum, vit higartil hava sagt, fáa fram hugsanir, sum ikki samsvara við tær ógvusligu broytingar, ið vit øll ganga inn í og uppliva í dag, og tí eru søgurnar kanska heldur ikki gagnligar í einari tíð sum okkara. Í *Korallbruna* eru verur og lutir í sínámillum

ávirkan, og sum Latour staðfestir eru hesi: "actors and not simply the bearers of symbolic projection". Í yrkingunum er eitt "eg", sum ikki kann flyta sínar eginleikar út á hesar verur og spegla sær í teimum (kenna seg aftur) og ei heldur brúka tær til ávíst endamál.

## Samanumtøka

Evnisliga snaringin í viðgerðini av bókmentum ger vart við sambond í okkara umhvørvi, sum tað ikki ber til at trína inn í ella út úr, tí vit eru altíð í teimum, og vit ávirka og verða ávirkað. Diana Coole & Samantha Frost skriva í fyrstu reglunum í *New Materialisms. Ontology, Agency, and Politics*:

> As human beings we inhabit an ineluctably material world. We live our everyday lives surrounded by, immersed in, matter. We are ourselves composed of matter [...] Our existence depends from one moment to the next on myriad micro-organisms [...] bodily and cellular reactions [..] on the material artifacts and natural stuff that populate our environment (Coole & Frost 2010: 1)

Vit eru tilfar og kring okkum og í okkum eru livandi verur og evni. Bókmentagranskingin verður við evnisligu snaringini loyst frá at taka støði í menniskjunum einans til at síggja størri heildir og samanhangandi virknaðir millum ólíkar verur og evni, eins og tað verður gjørt við vøkstrinum, gøgnunum og søltu vætunum í "eg" og havinum í *Korallbruna*. Ikki allir tekstir leggja upp til viðgerð sum ta í hesi greinini, har hugtøk sum ANT og samanrenning, "assemblage", vísa seg at hóska sera væl. *Korallbruni* avdúkar harumframt, hvussu avgerandi orðini eru fyri, hvussu vit skilja okkum sjálv í mun til alt annað kring okkum. Vistgreining og evnislig snaring eru tískil ikki einans tematikkur og boðskapur um, at vit mugu geva sambondum og javnvágum á jørðini ans, men eisini ein kanning av, hvussu vit siga og hava sagt søgur um okkum sjálv og okkara umhvørvi.

## Bókmentir

Aldudóttir, Silja. 2018. *Náttúra í føroyskum náttúruyrkingum. Ein vistgreiningarlig kanning av, hvussu náttúra formliga verður skapað í føroyskum náttúruyrkingum*. Óprentað MA-ritgerð. Føroyamálsdeildin/Fróðskaparsetur Føroya.

Andersen, Hans Christian. 1970. *Eventyr og Historier*. Gyldendals Bibliotek, Det danske akademi.

Andri Snær Magnason. 2019. *Um tímann og vatnið*. Mál og menning. Reykjavík.

Bennett, Jane. 2015. "Systems and Things". Í *New Literary History*, Vol. 43, No. 2. Johns Hopkins University Press, p. 225-233.

Bennett, Jane. 2010. *Vibrant Matter. A Political Ecology of Things*. Duke University Press. Durham/London.

Deleuze, Gilles & Guattari, Félix. 2024. *Tusind plateauer, Kapitalisme og skizofreni*. Det Kongelige Danske Kunstakademis Billedkunstskoler - A Mock Book.

Cole, Diana and Frost, Samantha. 2010. *New Materialisms. Ontology, Agency, and Politics*. Duke Univeristy Press, Durham/London.

Hiltner, Ken (ed.). 2014. *Ecocriticism. The Essential Reader*. Routledge, London/New York.

Jógvansdóttir, Anna Malan. 2018. *Korallbruni*. Eksil.

Latour, Bruno. 2013. *We Have Never Been Modern*. Translated by Catherine Porter. Cambridge, Massachusetts.

Latour, Bruno. 2005. *Reassembling the Social. An Introduction to Actor-Network-Theory*. Oxford University Press. Oxford/New York.

Morton, Timothy, 2010a. *Ecology Without Nature. Rethinking Environmental Aesthetics*. Harvard Univeristy pres, Cambridge, Massachusetts/London, England.

Morton, Timothy. 2010b. *The Ecological Thought*. Harvard University Press, Cambridge, Massachusetts/London, England.

*Ny Jord*. 2020. Red. Carstensen, Jeppe Sengupta. Nr. 5. Forlaget Virkelig, København,

Selesky, Karen. 1996. "Singing of what they no longer are"?: The Role of Traditional Inuit Myth and Legend in Contemporary Inuit Narrative and Visual Art. Í *The Northern Review* No. 17 (Winter), bls. 71-84.